# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein smeitur

NATO toppfundurin í Bukuresti gjørdist ein dyggur smeitur fyri USA og George W. Busch og hartil eitt bakkast fyri tann ágangandi uttanríkis- og trygdarpolitikk, sum teir neokonservativu kring Busch nú í skjótt átta ár hava roynt at noyða inn á allan vesturheimin. Hetta, at ameriski forsetin ikki fekk sín vilja í spruninginum at sleppa Ukraina og Georgia upp í NATO, er ein stórur uttanríkispolitiskur ósigur fyri forsetan. Hann hevði ætlað at troka NATO heilt inn á russiski landamørkini og soleiðis byrgja tað europæiska Rusland inni. Hesin politikkur, sum er ein liður í royndunum hjá teimum neokonservativu at breiða út ta serstøku amerisku útgávuna av tí liberalistiska demokratiin, er miseydnaður.

Ósigurin hjá ameriska forestan er eingin ósigur fyri fólkaræðið. Hesin ágangandi uttanríkispolitikkurin hevur jú ikki økt um trygdina í heiminum -heldur tvørturímótimen. Busch tók eftir Clinton ein heim, har heimsfriður ongantíð í nýggjari tíð hevði havt tað betri. Kalda kríggið var væl og virðiliga av og tað kaos, sum natúrliga kom í kjalarvørrinum á nýggju heimsskipanini var hasað av. Tað nýggja Rusland og NATO vóru í friði og náðum í ferð við at finna ein samstarvsform, sum allir partar kundu liva við. So komu teir neokonservativu í USA til valdið og fóru undir at grava fram gamlar figgindamyndir og at skapa nýggjar. Hetta snúi seg um nýggja vápnadubbing, um valdið í heiminum og ræði á teimum orkukeldum, sum USA trýtur. Heimurin er vorðin ótryggari og eitt nýtt kalt kríggj er við at byrja, og hetta er at kalla alt teimum neokonservativu kring feðgarnar Busch fyri at takka.

Men nú gekk hetta so ikki longur. Týskland og Frakland hava fingið nóg mikið og í Bukuresti settu tey bæði Merckel og Sarkozy forsetanum stólin fyri dyrnar. Ein møguligur limaskapur hjá Ukraina og Georgia hevði verið ein so stór provokatión mótvegis Rusland, at tann friður og tann stabilitetur, sum hóast alt valdar í Europa, høvdu komið í stóran vanda. Hartil kemur, at Týskland og Frakland illa hava ráð at koma til illnar við Rusland. Týskland er púra hevt at russiskum gassi og sámiligum prísum á hesum gassi. Rusland kann við at snara fyri ella við at hække gassprísirnar sum einki týna týska búskapin. Her er heilt einfalt ikki ráð til uttanríkispolitiskan ævintýrpolitikk. Frakland hevur langa søguliga siðvenju fyri góðum samstarvi og góð viðurskifti við Rusland og hesi viðurskifti var Sarkozy ikki sinnaður at offra fyri ideologisku krossferðina hjá feðgunum og teirra neokonservativu fylgisneytum.

**Sosialurin**

## Kjakmentan og Dawkins

SÍMUN ABSALONSEN



Í grein míni “Ein kjakmentan í kreppu?” sum stóð í Sosialinum herfyri nevndi eg m.a., at tann gitni Richard Dawkins metir, at Antony Flew helst er senilur.

Guttormur Djurhuus eftirlýsir nakrar dagar seinni kelduna til hesa útsøgn.

Onkur spyr kanska hvørjir Dawkins og Flew eru.

Richard Dawkins er bretskur professari í lívfrøði. Hann man helst vera heimsins kendasti nýateistur og gitin fyri sína harðrendu skriving ímóti øllum sløgum av átrúnaði.

Antony Flew er somuleiðis breti ( f. 1923). Faðirin var sera virkin innan metodistkirkjuna og Antony fekk eina kristna uppaling. Kortini gjørdist hann ateistur á ungum aldri. Hetta kom tó ikki alment fram fyrr enn nøkur ár seinni, av tí at Antony ikki vildi særa kenslur foreldranna.

Flew fekk eina gylta akademiska lívskós. Hann gjørdist professari í heimsspeki og høvudur av mongum bókum og ritum. Tað fyrsta av 35 verkum um heimsspeki nevndist “Theology and falsification”.

Flew var partur av tí sonevnda “Socratic Club” í Oxford – eitt kjakforum, har m.a. tann kendi C.S. Lewis hevði ein stóran leiklut. Flew og Lewis kendust persónliga, men kristnu sjónarmið Lewis høvdu ikki stórvegis ávirkan á Flew.

Tað kom óvart á mong tá Antony Flew í 2004 kunngjørdi, at hann hevði slept síni ateismu og var vorðin “deistur”. Pressan gjørdi nógv burturúr hesum.

Richard Dawkins hevur síðani úttalað seg fleiri ferðir um sín fyrrverandi “trúarfelaga”. Dawkins minnir altíð fólk á, at Flew er gamal. Hetta ger hann eisini í bókini “The God Delusion”, har hann knýtir “fráfallið” hjá Flew við aldurin.

Dawkins sigur aðrastaðni, at sjónarmiðini hjá Flew borga ikki fyri “the surviving power that Flew once had as an intellectual”. Hann umtalar eisini Flew sum ein fyrrverandi stóran heimsspeking.

Hetta verður av flestøllum, og ikki minst viðhaldsfólkum hjá Dawkins tulkað soleiðis, at Dawkins setur spurnartekin við andsevnini hjá tí gamla Flew. Niðurstøðan er kanska ikki so løgin, tí smb. skrivingina hjá Dawkins er skilvísi og upplýsing ein trygg leið til gudloysi.

Tað er tí kanska ikki so løgið, at amerikumaðurin Michael Ruse (professari í heimsspeki á Florida State University) tekur soleiðis til um skrivingina hjá Dawkins: “The God Delusion makes me embarrased to be an atheist.”

Útsøgnirnar frá Dawkins um Flew eru eisini umrøddar “preface” í bókini “There is a God” eftir A. Flew. Bókin kom út í 2007. Tey, ið lesa hesa bók, kunnu so meta um mentalu støðuna hjá Flew.

**Keldur**:

Richard Dawkins:The God Delusion
Alister McGrath:The Dawkins Delusion
Antony Flew: There is a God
YouTube:
Dawkins: Røða í Virginia t. 23.10.2006

## Umhvørvið sett á breddan

EYÐGUNN SAMUELSEN
løgtingskvinna



Løgtingið viðger í løtuni eitt uppskot frá Landstýrinum um umhvørvisavgjøld á motorakførum. Uppskotið snýr seg um at umleggja ein part av verandi skrásetingargjaldi til ávikavist CO2 avgjald fyri vanligar bilar, og eitt umhvørvisavgjald fyri lastbilar, bussar og vøruvognar. Eisini verður skotið upp hækka burturbeiningargjaldið úr 1500 kr. til 5.000 krónur.

Uppskotið kemur at hava við sær, at jú minni tín bilur dálkar, jú minni er avgjaldið, meðan keypir tú ein bil, ið dálkar illa, so má tú gjalda meira. Orðaskiftið við 1. viðgerð vísti eisini, at breið semja er í løgtinginum um uppskotið.

Hetta, at knýta avgjaldsog umhvørvispolitikk saman er, eftir mínum tykki í tøkum tíma. Alt ov longi hava vit bert tosað um at gera nakað fyri at verja umhvørvið, meðan gerðirnar hava manglað. Hetta uppskotipð kann tykjast sum smáting í mun til avbjóðingina við umhvørvinum, men tað, ið hevur tann stóra týdningin er, at nú byrja vit at taka ítøkilig stig til at verja umhvørvið.

At taka atlit til umhvørvið er í stóran mun ein spurningur um hugburð og at vit eggja fólki til at hugsa um umhvørvi. Øll kenna til, at gamlir bilar liggja og sløðast í natúruni. Hækkingin av burturbeiningargjaldinum er eitt tiltak, ið skal stimbra undir at ruddað verður upp í hesum, og at bilarnir verða burturbeindir ístaðin fyri at liggja og sløðast.

Tað er eisini eitt gott og positivt signal mótvegis umheiminum, at Føroyar kunnu vísa á, at okkara avgjaldslóggáva er skipað so, at vit taka atlit til at minka um CO2 útlátið sum vit hava bundið okkum til í ST-veðurlagssáttmálanum og Kyoto- sáttmálanum.

Sitandi samgonga hevur sett sær fyri, at Føroyar skulu ganga á odda í tilfeingisrøkt, so at vit kunnu lata børnum okkara eitt ríkt og livandi umhvørvi. Samgonguskjalið sigur, at miðað verður eftir at flyta Føroyar yvir í ein “reinorkubúskap”, so vit taka okkara part av ábyrgdini at minka globala útlátið av CO2.

Fyriliggjandi uppskot er eitt lítið men týdningarmikið stig á leiðini.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.